# Ási Jacobsen

**25. des. 1940 – 11. okt. 2009**

Ási var sonur Albert og Emilie á Sentralinum. Í 1970 tók hann lærara-prógv frá Holbæk Seminarium og var lærari á Tvøroyri alla sína lærara-tíð.

Hann var á ársskeiði í Danmark skúlaárið 1987 – 88. Men áðrenn hann fór á læraraskúla, var hann í donsku marinuni, og hetta tosaði hann ofta um. Hann fór frá við eftirløn fyri nøkrum árum síðani.

Ási var ein sermerktur persónur. Hann var fyrikomandi, fryntligur og lagaligur. Á lærarastovuni fylti hann nógv, hann var ofta tað nátúrliga snúningspunktið í fríkorterunum. Hevði tú okkurt ivamálið, so var hann altíð til dystin fús at koma við góðum ráðum og vegleiðing.

Hann hevði sera góð evni at skipa fyri, og mong mugu tey vera, sum hava fingið gleði av hansara góða førleika sum fyriskipari – bæði á



handans og andans øki, til álvara og gamans. Eitt skifti var hann í nevndini fyri Húsalánsgrunnin. Í nógv Harrans ár var hann ein av sangarunum, sum sungu fyri til jarðarferðir.

Hesi seinasti árini var heilsan farin at bila. Skilliga sást á honum, at livimátin ikki var hin besti. Spurdi tú hann, so læt hann altíð væl at, at gremja seg var honum so fjart. Men nú orkaði hann ikki longur. Sjálvan brúdleypsdagin varð hann lagdur til hvíldar undir Akursgerði. Fylgið, sum fylgdi honum til hansara seinasta hvíldarstað var stórt, eitt tekin um, hvussu væl lýddur hann var.

Góða Gitte, Eyðun og Guðrun. Vit vita, hvussu svárt tað má verða hjá tykkum, nú hann er farin, men okkara og tykkara troyst er, at hann er í góðum hondum har, sum eingin sorg og pína er.

**Við samkenslu**
**Starvsfelagarnir**

## Til minnis um
# Joen Jacob Gaard Joensen (Gubba-Jack)

**f. 24.07.1945 – d. 02.08.2009**



Nú tað aftur eru jól, hugsa vit um Joen Jacob Gaard Joensen. Gubba-Jack, sum vit kendu hann. Og omba-Jack, sum dóttir okkara, Døgg, kendi hann.

Hann helt jól saman við okkum í Sandavági seinasta ár. Vit vitstu ikki, at hetta føru at verða hansara seinastu jól. Vit høvdu eini sera hugnalig jól. Einasta minus var – eina løtu – at Omba-Jack fekk mandluna. Hetta dámdi Døgg (sum er 5 ár, hon var 4 ár tá) sera lítið. “Eg varð ordiliga súr”, segði hon einaferð seinni. Men nú er hon ordiliga glað um, at Omba-Jack fekk mandluna.

Gubba-Jack búði í Danmark, men hann var ofta heima og vitjaði. Tað er ikki ov nógv sagt, at hann fylti nógv í tilverum okkara, tá hann var heima. Á tann góða háttin. Barndómsheimið, sum stendur á Soylheygnum í Skopun, er enn í familjuni, hóast ongin av systkjunum býr í Sandoynni í dag. Og Jack var tann, sum helt fast um hetta. Hann kundi ikki koma heim til Føroya, uttan at hann fyrst av øllum skuldi til Skopunar. Slapp hann ikki tað, var tað ongin heimtúrur. Skopun var heimið, hjartað og grundarlagið, og Jack elskaði at vera har. Í summar kom Jack heim í juni mánaða, tí at brúdleyp var í Vestmanna. H ann kom til Føroya kvøldið fyri brúdleypið, men har var onki at gera, til Skopunar skuldi hann fyrst. Sjálvur hevði hann onki koyrikort, so tað var at seta himmal og jørð í rørslu, soleiðis at Jack slapp suður til Skopunar, og síðani morgunin eftir at fara eftir honum og fáa hann til Vestmanna. Soleiðis var Jack. Og soleiðis var lívið við Jack í tí.

Hann var so ótrúliga glaður tá hann var heima seinasta juni mánað. Í brúdleypinum skein hann av gleði, tó at nýrasjúkan tyngdi hann ovmikið. Hann gisti í Sandavági, á veg aftur til Danmarkar, og hann sang og veipaði við ørmunum um kvøldið, og lagið var eisini fantastist, tá vit um morgunin ótu okkara allarseinasta morgunmat saman.

Døgg og pápin koyrdu Jack út á flogvøllin henda morgunin í juni. Hann var glaður og klemmaði okkum fast, áðrenn hann fór avstað. Segði farvæl, takkaði fyri seg, og fór. Hann kom ongantíð heim aftur til Føroya. Dagarnir eftir hetta, gjørdist hann alsamt verri fyri, og seinastu tíðina skiftust systkin hansara um at vera hjá honum. Í august andaði Gubba-Jack fyri seinastu ferð. Kroppurin orkaði ikki meiri. Hjartað hevði ikki meiri sløg eftir. Seinastu ferð Jack tosaði við systkin síni, lat hann tað vera greitt, at hann hevði frið við at fara heim til skapara sín, og tað troystar løtur sum hesar - tá saknurin, sum alla tíðina er til staðar men sum gerst enn størri, tá løtur eru kenslubornar og jól eru.

Eftir eina minnisløtu í Keypmannahavn, varð Jack jarðaður í heimbygdini, Skopun. Hetta var ein serstakliga vakur dagur, og tað kendist sjálvsagt og náttúrligt, at ferð hansara á fold endaði, sum hon byrjaði. Í Skopun, har barndómsheimið á Soylheygnum enn stendur, eitt sindur tómari nú, Jack er farin, men enn er tað heim hjá teimum, sum hoyra heima har.

Við hesum vilja vit lýsa frið við minninum um Joen Jacob Gaard Joensen. Takk fyri alt.

*Sandavágur, jólini 2009*
**Petur**

## Føðingar



*9. desember fingu Adrian og Silja eina lítla systur. Hon var 54 cm long og vigaði 4950 gr. Foreldrini eru Jacobina Thomsen og Páll M. Kjærbæk, Tórshavn.*

6. desember fingu Annika Fay Joensen og Petur Kristian Nielsen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3850 gr.

7. desember fingu Petra E. Petersen og Mortan Hust Petersen, Kvívík, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3100 gr.

7. desember fingu Brynja Dam Poulsen og Janus Djurhuus, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 44 cm long og vigaði 2000 gr.

8. desember fingu Vígdis Berg og Birgir Strøm Rasmussen, Trongisvágur, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3950 gr.

10. desember fingu Karin og Sjúrður Kunoy, Kunoy, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3670 gr.

11. desember fingu Unn Lützen, Tórshavn, og Niels Juul Nielsen, Saltangará, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3590 gr.

11. desember fingu Maria Skaalum Petersen og Høgni P. Vilhelm, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3250 gr.

15. desember fingu Alexandrina A. Petersen og Mads Grosen, Svendstrup J, DK, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3200 gr.



### Dagurin

18. desember. Gratianus, deyður umleið ár 300. Biskupur í Tours í Fraklandi. Varð tikin av døgum, tá ið Desius keisari ráddi.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Susan Andreassen, Toftir**, andaðist mikudagin á Landssjúkrahúsinum, 56 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin kl. 18 í Fríðrikskirkjuna. Jarðarferðin verður úr Fríðrikskirkjuni á Toftum leygardagin kl. 13.

**Trinelena Joensen, ættað úr Klaksvík, búsitandi í Ballerup**, andaðist í heiminum mikudagin, 82 ára gomul.